

# KT-samskipari til FT Online

## FT Online søkir eftir samskipara til KT-menningina á deildini

FT Online er nýggj deild á Føroya Tele, ið umsitur og mennir onlinetænastur felagsins, umframt útgávuna av Telefonbókini. Onlinetænasturnar, ið talan er um, eru portal.fo, sportal.fo, planet.fo, nummar.fo og gulu.fo.

Vit kunna bjóða einum komandi starvsfelaga góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning, umframt góðar og nýmótans arbeiðsumstøður.

**Arbeiðsinnihald**
Arbeiðið fevnir um at samskipa partar av KT-menningini hjá FT online. Samskiparin skal m.a. standa fyri kravfestingum og prosjektleiðslu í mun til menning av nýggjum tænastum á onlineøkinum, eins og viðkomandi kemur at standa fyri samskifti við uttanhýsis KT-veitarar og við innanhýsis KT-umhvørvið á Føroya Tele.

Vit ímynda okkum, at tann, ið fær starvið, hevur royndir á hesum økjum:

- Prosjektleiðslu av KT-verkætlanum
- Ger av kravfestingum, analysu og designi á KT-økinum
- PHP, MySQL umframt onnur forritanarmál og aðra databasutøkni
- Viðkomandi útbúgving ella drúgvar royndir á økinum

Vit rokna eisini við, at rætti umsøkjarin hevur:
- Hugsjónir um internetið
- Góðan kunnleika til føroyskt og enskt
- Nærlagt og sjálvstøðugt arbeiðslag
- Jaligt sinni og góð samskiftisevni

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av CV og viðkomandi skjølum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 4. mai 2009 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Óla á Deild Olsen á tel. 243011 ella á odo@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina á tel. 303030.

Føroya Tele er fremsta KST-fyritøka í Føroyum. Felagið er eitt samtak av einum móðurfelag og trimum dótturfeløgum. FT Online er partur av móðurfelagnum.

FØROYA TELE

SENDISTOVAN

---

Minnist til: tað er ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin 2. mai

## 62°N airport hotel bjóðar

# *Stóra spanska-griska buffét*

*2. mai frá kl. 12.00-22.00*



## Matarskrá

- Serrano skinka og chorizopylsa við oliven
- Bruchetta við hvítleyki og tomat
- Høsnarungi við hunangi og sinnopi
- Katalanskir kjøtbollar
- Melónsalat við várleyki og chili
- Ostagratinerað toskaflak og rækjur í tomatchilisauce
- Hunangsmarinerað høsnarungalør
- Grikst moussaka við oksakjøti, auberginum og eplaskivum
- Stifado: Oksakjøt í terningum og leyki í kraftmiklari reyðvínssós
- Salatbarr við tomatsalati, feta, oliven, tzatziki, ertrum, marineraðum hvítleyki, agurkuskivum og skornum salati
- Heimabakað breyð og grisk epli





3 áhugaverdar dessertir

**Fyri hvønn einans kr. 195,-**
**Børn gjalda ½ prís**



62°N airport hotel

Bíleggið borð
á tel. 30 90 90

380 Sørvágur · tel: 30 90 90
fax: 30 90 91 · hotel@62n.fo